Helgi Abramhamsen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 5/2019 frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni um ljóðdálking, settur landsstýrismanninum í umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Spurningurin var soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað fyri at tryggja heimafrið hjá fólki, sum búgva í økjum, har ljóðdálking frá skipum er ein trupulleiki?
2. Um so er, hvussu ætlar landsstýrismaðurin at loysa trupulleikan við manglandi heimafriði?

Svar:

Til spurning 1

Landsstýrismaðurin ætlar at bera so í bandi, at til ber at tálma ljóðdálkingina frá skipum, sum liggja í havn. Í komandi viku verður fundur við felagið Heimafrið og í næstum er ætlanin at kalla kommunurnar inn til fund at viðgera málið.

Til spurning 2

Ætlanin er í samráð við kommunurnar, við kunngerð, at seta tiltøk í verk, sum kunnu tálma ljóðdálkingina frá skipavirksemi í havnum. Landsstreymur er eisini ein partur av svarinum, men her og nú er neyðugt at fáa sett í verk eina tilgongd, sum við tíðini kann tryggja, at ljóðdálkingin verður tálmað. Spurningurin um landsstreym fer eisini at verða viðgjørdur, men neyðugt verður við lógarfyrireikandi arbeiði, sum kann tryggja, at vit fáa teir røttu karmarnar fyri landsstreym.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 16. oktober 2019

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður